# Føroya Kolvetni fer nú at bora




*Tað er beint norðan fyri Buzzard-økið, sum sæst miðskeiðis á kortinum, at Føroya Kolvetni nú ætlar sær undir veruliga oljuframleiðslu*

**Avtala er gjørd við kanadiska Oilexco um at bora á Halibut-Horst økinum í norðsjónum. Kanadiska felagið átekur sær 80% av útreiðslunum, men Føroya Kolvetni fær heili 45% av oljuni**

**OLJUBORING**
*Jákup Mørk*

Partabrævkursurin hjá Føroya Kolvetni fekk eitt ordans spark uppeftir, tá Føroya Kolvetni í dag kundi boða frá, a tavtalu er gjørd við kanadiska Oilexco um oljuboring í Halibut-økinum.

Hetta økið er beint norðan fyri Brasso-feltið, sum sæst á kortinum her á síðuni, og tað er einki at ivast í, at kanadiumenn hava stórar vónir til ætlaðu boringarnar. Somikið stórar eru vónirnar, at Oilexco vil átaka sær 80% av leitingarútreiðslunum, samstundis sum teir bara fáa 55% av oljuni, sum møguliga streymar úr feltinum.

Við øðrum orðum vil tað siga, at vágin hjá Føroya Kolvetni verður lutfalsliga væl lægri enn møguliga úrtøkan.

Oilexco hevur langtíðar leiguavtalu um boritútgerð, og tí er tað ein stórur fongur hjá Føroya Kolvetni at gerast partur av slíkum samstarvi, heldur enn at felagið sjálvt noyðist at fáa fatur á - og rinda fyri - slíka útgerð.

Halibut feltið er 217 ferkilometrar til støddar, og borað verður á 140 metra dýpi. Feltið er á markinum á sonevnda Witch Ground Graben, har metta oljugoymslan er fleiri milliardir tunnur. Somuleiðis eru stóru Piper- og Claymore feltini ikki langt burturi, og tí verða stórar vónir settar til komandi boringarnar.

– Hetta er ein frálík avtala fyri felagið og fyri partaeigararnar. Vit hava við hesum tryggjað okkum bæði fíggjarligu styrkina og teknisku útgerðina til eina sera spennandi ætlan. Samstundis styrkir hetta eisini okkara fatan av, at vit hava valt røttu strategiina, tá vit hava keypt okkum stórar partar av nú 15 felt- stjóri í Føroya Kolvetni í tíðindabrævi, sum er sent enska partabrævamarknaðinum.

## FAKTA

Kursurin á Faroe Petroleum hækkaði nærum 8%, tá tíðindaskrivið um avtaluni við Oilexco varð sent. Úr 139 pence í 150 pence fyri partabrævið.

Í krónum or oyrum merkti hetta, at virðið á felagnum vaks við nærum 66 mió kr. Samlaða virðið á Atlantic Petroleum er nú knappar 900 mió kr.

# Innbrot í Sjónvarpinum

**Høvdu »Syngið við« og »Føroya stuttligasti« ikki verið spældir yvir á band undan jólunum, høvdu føroysku hyggjararnir verið hesar fyriuttan um ársskiftið**

**INNBROT**
*Jákup Mørk*

Allar ráupptøkur og tær báðar liðugt kliptu sendingarnar vóru nevnliga á telduni, sum um jólini varð stolin úr Sjónvarpinum.

Karsten Arnskov á Tøknideildini í Kringvarpinum sigur, at tey enn ikki vita við vissu, hvussu tjóvarnir hava borið seg at.

– Tað er tó líkt til, at hesir eru komnir inn gjøgnum eina hurð, sum er á takinum í Sjónvarpsbygninginum. Har hava tey so helst fingið hurðina av, áðrenn farið er inn eftir lutunum, sum tiknir eru.

Karsten sigur víðari, at stuldurin meira enn nakað er irriterandi.

– Sum so vóru tað mest smálutir, sum vórðu stolnir. Og tíbetur hava vit avrit av øllum tí, sum var á telduni. Men eitt nú skulu vit nú til at savna ljóðarkivið aftur, eins og tað sjálvandi er spell, tá ráupptøkurnar til sendingar eru burtur. Tí vil eg siga, at talan ikki er um nakra vanlukku fyri okkara viðkomandi. Men tað er næstan meiningsleyst, tá vit nú aftur skulu nýta orku til at uppbyggja eitt arkiv, sum vit longu hava gjørt einaferð, sigur hann.

# Skrivaði 228.000 í koyriendurgjaldi

**Hóast tað verður alment avsannað, at koyripengar vóru orsøkin til uppsøgnina, so tykist samanfallið millum hetta og uppsøgnina frá Dagmar Joensen ógvuliga merkisvert**

**RÚSUSTJÓRIN**
*Jákup Mørk*



*Dagmar Joensen skrivaði sær í árunum 2001-2004 228.000 krónur í koyripeningi. Hetta hevði hon ikki heimild til, og peningurin er nú afturgoldin*

Bara fimm dagar eftir at Landsgrannskoðarin í grannskoðanarprotokollini staðfesti, at útgjald av koyriendurgjaldi til stjóran ikki samsvaraði við lóggávuna, segði Dagmar Joensen seg úr starvi.

Ov nógv arbeiði og ynski um betri tíð til familjuna, segði hon tá vera orsøkina til avgerðina. Ein orsøk, sum hon sambært Útvarpinum eisini heldur fast um í dag.

### 228.000 skattafríar krónur

Útvarpið kundi annars í gjár staðfesta, at stjórin í Rúsdrekkasøluni í árunum 2001 til 2004 hevur fingið útgoldið 228 tkr. ov nógv í koyriendurgjaldi.

Koyriendurgjald verður vanliga latið, tá starvsfólk nýta egnan bil í ørindum fyri arbeiðsplássið. Endurgjaldið er tá 2,90 kr. fyri fyrstu 10.000 kilometrarnar, og síðani 1,90 fyri hvønn kilometurin.

Stjórin á Rúsdrekkasøluni hevði í tíðarskeiðinum eisini skrivað sær koyripening fyri flutning til og frá arbeiði. Og tað er ikki tað sama, sum ørindi fyri arbeiðsgevaran.

Skattalógin hevur nevnliga greiðar ásetingar um, at er talan um flutning til og frá arbeiði, so ber til at søkja um stuðul til ferðaútreiðslur. Her er gjaldið frá Toll- og Skattstovuni 37 oyru fyri hvønn kilometurin aftur og fram - fyrstu 15 km tó undantiknir. Hartil kemur gjald fyri ávíkavist ferjuella tunnilsgjald.

Slíkan stuðul - íalt knappar 30 tkr. í fýra ár - hevði Dagmar Joensen eisini søkt um sambært Útvarpinum, men hartil komu so tær 228 tkr., sum hon hevur fingið útgoldið skattafrítt sum koyriendurgjald.

Í hoyringsskrivinum sigur Dagmar Joensen sambært Útvarpinum, at tað var neyðugt hjá sær at hava egnan bil við til arbeiðis. Rúsdrekkasølan hevur ikki bil tøkan, og hjá stjóranum var neyðugt at vera mobil.

Tað frágreiðingina vildi landsgrannskoðanin tó ikki góðtaka, og 7. september 2005 varð tí staðfest, at koyriendurgjaldið var útgoldið av órøttum. Bara fimm dagar seinni segði Dagmar Joensen seg úr starvinum.

Útvarpið kundi víðari upplýsa, at peningurin, sum talan er um, nú er afturgoldin Einkarsøluni, og at meira ikki verður gjørt við málið.

Heldur ikki bar til at fáa viðmerkingar frá Landsgrannskoðarunum um hetta.